# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Debutantur tryggjaði Aston Villa met

**Emile Heskey syrgdi fyri, at Aston Villa fekk sætta útivallarsigurin á rað. Hetta er met hjá felagnum, sum nú er frammanfyri Chelsea og ájavnt Liverpool á stigatalvuni**

PREMIER LEAGUE
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fimm sigrar á rað. Tað hevði Aston Villa megnað undan dystinum ímóti Portsmouth í gjárkvøldið. Eitt flott avrik, sum felagið tó hevði megnað fýra ferðir áður í søgu felagsins.

Í dag ber til at staðfesta, at Aston Villa hevur umskrivað egna søgu. Teir vunnu nevniliga við einum máli móti ongum, og harvið hevur Aston Villa vunnið seks teir seinastu dystirnar, liðið hevur spælt á útivølli.

Sigurin hevur við sær, at Aston Villa fer fram um Chelsea og leggur seg upp undir liðina á Liverpool á stigatalvuni. Haraftrat er Aston Villa nú einans trý stig aftanfyri Manchester United, sum er fremst í Premier League. Her skal tó leggjast aftrat, at Aston Villa hevur spælt ein dyst meiri enn áðurnevndu lið.

Góða plaseringin á stigatalvuni staðfestir tó, at tað ikki einans er á útivølli, at tað hevur hepnast væl hjá Aston Villa. Liðið hevur nevniliga ikki tapt seinastu 11 dystirnar. Av teimum er talan um átta sigrar og tríggjar javnleikir.

Hetta er prógv um, at Aston Villa er væl koyrandi. Tað sama kann sigast um seinasta keypið hjá Aston Villa, Emile Heskey. Hann hevur roynst ógvuliga væl hjá Wigan í ár, og nú flytingarvindeyga var opið, valdi Aston Villa at rinda umleið 30 milliónir krónur fyri 31 ára gamla enska landsliðsleikaran.

Í gjárkvøldið spældi Emile Heskey sín fyrsta dyst fyri Aston Villa, og hann vísti, at keypið av honum neyvan er tað býttasta, Martin O'Neill hevur gjørt í síni yrkisleið sum manager.



*Jermaine Pennant og Emile Heskey, báðir fyrrverandi Liverpool-leikarar, í dysti fyri nýggj feløg í gjárkvøldið*

*Mynd: Polfoto*

## United setti eisini met

Tað var tó ikki einans Aston Villa, ið setti met í gjárkvøldið. Manchester United setti eisini nýtt Premier League-met, tá teir megnaðu at halda mótstøðuliðnum frá at skora 11. dystin á rað.

Seinasta leikumfar útjavnaðu teir gamla metið hjá Chelsea, ið helt málið reint tíggju dystir á rað. Men við 5-0 sigrinum á West Bromwich í gjárkvøldið setti Manchester United nýtt met.

Berbatov og Rooney syrgdu fyri eini tryggari hálvleiksleiðslu. Í seinna hálvleiki økti Vidic til 3-0, áðrenn Ronaldo staðfesti sigurin við tveimum málum. Endaliga úrslitið kundi lættliga verið størri, og arbeiðsumstøðurnar hjá Manchester United vóru eisini góðar, tí allan seinna hálvleik spældi West Bromwich við tíggju monnum, eftir at málverjin Paul Robinson varð vístur av vølli.

## Tottenham gjørdi skjótt av

Í botninum tók Tottenham ímóti Stoke. Liðini høvdu bæði 21 stig – og tað sama høvdu West Bromwich, Middlesbrough og Blackburn. Tottenham vann 3-1 og dregur tískil frá botninum. Málini gjørdu Lennon, Defoe og Dawson eftir bara 25 minuttir vóru spældir. Í seinna hálvleiki minkaði Beattie um munin fyri Stoke.

Fjórði og síðsti dysturin í gjárkvøldið var ímillum Fulham og Sunderland. Tað vóru gestirnir, ið vunnu henda dystin við máli frá Kenwyne Jones.

## Trýst á toppliðini

Sigurin hjá Aston Villa í gjárkvøldið merkir, at teir nú av álvara blanda seg í oddastríðið. Hetta hevur aftur við sær, at trýstið á Liverpool og Chelsea, sum skulu í eldin í kvøld, er økt uppaftur meira.

Í botninum er støðan eisini spent. Fýra tey niðastu liðini hava 21 stig, men einans trý stig eru upp til 13. plássið, sum Tottenham hevur yvirtikið við sigrinum á Stoke í gjørkvøldið.

### Úrslitini í gjárkvøldið:

West Bromwich - Manchester United 0-5
Tottenham - Stoke 3-1
Portsmouth - Aston Villa 0-1
Sunderland - Fulham 1-0

### Dystirnir í kvøld:

Wigan - Liverpool
Manchester City - Newcastle
Chelsea - Middlesbrough
West Ham - Hull
Everton - Arsenal
Blackburn - Bolton

### Støðan í Premier League:

1 Manchester United 50
2 Liverpool 47
3 Aston Villa 47
4 Chelsea 45
5 Arsenal 41
6 Everton 36
7 Wigan 31
8 West Ham 29
9 Hull 27
10 Fulham 26
11 Sunderland 26
12 Manchester City 25
13 Tottenham 24
14 Portsmouth 24
15 Bolton 23
16 Newcastle 23
17 Blackburn 21
18 Middlesbrough 21
19 Stoke 21
20 West Bromwich 21

# Finalistarnir skulu finnast

**Í trimum av fýra hálvfinalum tykist spenningurin avgreiddur, meðan tað kann verða sera tætt í Kollafirði í annaðkvøld**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lítil ivi er um, at Stjørnan og Tjaldur hittast í kvinnufinaluni í steypakappingini, meðan Kyndil tykist eins tryggur luttakari hjá monnum.

Stóri spenningurin er í so máta hóskvøldið, tá KÍF tekur ímóti Neistanum í tí, sum líkist einum sonnum braki. Sera óvæntað vann KÍF fyrru hálvfinaluna við tveimum málum, og við fyrimuninum av heimavølli er als ikki óhugsandi, at tað í ár verða kollfirðingar, sum vinna sær mest óvæntaða finaluplássi í eini finalu, sum væl kann standa millum tey bæði niðastu liðini í deildini.

Hinvegin er tað væl enn so, at Neistin má roknast sum favorittur undan dystinum í Kollafirði. KÍF hevur sveiggjað nógv í avrikunum, og um vikuskiftið løgdu teir rygg til stórtap á heimavølli. Neistin er framvegis við í kappingini um pláss í FM-finaluni, men seinastu vikurnar hava úrslitini verið alt annað enn góð, og í løtuni er tað H71, sum hevur fyrimunin í stríðnum teirra millum.

### Dystirnir

(fyrru úrslitini viðmerkt í klombrum)

**Hálvfinalur, kvinnur**
28.01 20.00 Neistin-Stjørnan (22-33)
29.01 18.30 Tjaldur-StÍF (29-23)

**Hálvfinalur, menn**
28.01 19.30 StÍF-Kyndil (17-25)
29.01 18.30 KÍF-Neistin (29-27)